Andras Róin:

Føroysk serstøða á fjarskiftisøkinum

Støðan hjá Føroya Tele og støðan á fjarskiftismarknaðinum er heilt serlig í Føroyum í mun til onnur lond. Frælsisgerðingin er komin langt áleiðis, men Føroya Tele er framvegis almenn ogn. Hetta er fylgir ikki mannagongdini í øðrum londum. Andras Róin helt fyrilestur um evnið á KT-messuni í síðstu viku

FJARSKIFTI
Heri á Rógvi

–Frælsisgerð og privatisering plaga at fylgjast at í øðrum londum, men í Føroyum verður hetta hildið hvør sær, sigur Andras Róin, stjóri fyri Føroya Tele.

Á stóru KT-messuni í síðstu viku var Andras Róin millum fyrilestrarhaldararnar.

Fyrilesturin hevði heitið Telesamskiftið í Føroyum – nú og í framtíðini. Tað var eitt rættiliga frítttalandi og opin Andras Róin, ið tosaði mestsum frítt frá livruni.

Støðan

Andras Róin greiddi í sínum fyrilestri frá, hvør støðan hjá Føroya Tele var. Hann lýsti, at Føroya Tele framvegis var eitt partafelag, ið tað almennaeigur. Hinvegin so er ein frælsisgerðing farin fram innan fjarskifti í Føroyum. Hetta sæst aftur í, at kapping nú er á økinum, har aðrir veitarar enn bert Føroya Tele bjóða seg fram sum veitarar av fjarskifti.

Andras Róin vísti á, at gongdin uttan úr heimi er tann, at fjarskifti verður liberaliserað, og hetta hava vit eisini fyri ein stóran part sæð í Føroyum. Munurin er bert tann í Føroyum í mun til aðrastaðni, at frælsisgerðingin sett ígongd, meðan tað ikki er sett ein privatisering ella einskiljing av fyrrverandi einkarveitaranum – Føroya Tele í Føroyum.

Andras Róin nevndi, at Norðurlond – okkara grannalond – eru framúr væl fyri, tá tað umræður fjarskifti. Tey eru at meta sum undangongulond í so máta, og hesi eru aloftast frammanfyri sína tíð.

Støðan hjá Føroya Tele er soleiðis, at Føroya Tele skal rekast sum ein og hvør onnur fyritøka, men hon hevur nakrar serligar treytir at ganga eftir. Eitt nú hevur Føroya Tele jú eina veitingarskyldu

Støðan hjá Føroya Tele er sostatt tvíbýtt. Hinar fyritøkurnar á fjarskiftismarknaðinum seta stór krøv til Føroya Tele, ið teir halda, at teir klára væl, men kappingarneytarnir ynskja støðugt meira.

Ein spurningur, ið hevur frammi, er spurningurin um, hvussu Føroya Tele skal skipast í framtíðini. Eisini í valstríðnum hevur hesin spurningurin verið uppi og vent, og Fjarskiftiseftirlitið hevur eisini verið frammi við ynski um, at Føroya Tele verður deilt í tveir partar – ein part, ið umsitur kervi, og ein part, ið verður rikin eins og allar aðrar fyritøkur á marknaðinum. Tað almenna skal eiga kervispartin. Hetta ynskir Andras Róin tó ikki skal gerast veruleiki. Hann vísir á, at í Liktinstein royndu menn eina líknandi loysn, og hetta gav at bíta í tann forstand, at stórt virksemi nú fer fram, soleiðis at hetta kann gerast aftur til eitt felag.

Andras Róin heldur tað vera eina vánaliga loysn at býta Føroya Tele í ein kervispart og ein vinnuligan part. Hann heldur hetta kann lættliga enda við misrøkt.

Rætting

Tað kemur fyri, at vit klára at skriva skeivt, soleiðis at veruleikin verður vendur á høvdið. Í greinini um Jónfinn Olsen, valevni fyri Miðflokkin, kundi lesaran ivast í einum navni. Sum tað eisini stendur í greinini, so eitur kona hansara Bjarta, og saman eiga tey bæði ein seks mánaðir gamlan son.

Tá hann nevnir, at samgongan skal fordøma øllum yvirgangi, so verður sipað til, at tað verða gjørdar – sambært Miðflokkinum – alt ov nógvar fosturtøkur í Føroyum.

Vónandi skuldi alt verið komið upp á pláss. Vit biðja lesararnar umbera okkum mistakið.

–HR

Henrik heitir á Bjarna

Henrik vil hava Bjarna Djurholm við til at loysa ósemjurnar millum Skipara- og navigatørfelagið og Fíggjarmálastýrið

Henrik Old, tingmaður, hevur sent eina áheitan til Bjarna Djurholm, landsstýrismann. Í áheitanini sigur Henrik Old, at hann hevði ynskt, at landsstýrismaðurin virka fyri, at Skipara- og navigatørfelagnum og lønardeildin í Fíggjarmálastýrinum aftur fara til samráðingarborðið. Hetta skal gerast við at heita á semingsmenninar, um at fáa partarnar saman aftur. Hendrik Old heldur, at semjan rakar fáar persónar hart. Harafturat heldur hann, at samráðingarnar áttu at verið fingnar frá hondini.

Tá vit tosaðu við Bjarna Djurholm, landsstýrismann, so hevði hann júst móttikið hetta. Hann var ikki heil greiður yvir, hvørjar heimildir hann hevur á økinum, men hann segði, at tú altíð kanst heita á partarnar. Hann sigur seg vera samdan við Henrik Old í tí, at verkfallið rakar nøkur fólk meint, og tað líkist ongum, at teir ikki samráðast, sigur hann.

Free Føroyar á flaggdegnum

Flaggdagur, FREE FØROYAR, vár og Roskilde dámur á Vaglinum í Havn.

TÍÐINDASKRIV

Eftir vanliga flaggdagshaldið hósdagin 25. Apríl, skipar Unga Tjóðveldi fyri stórari FREE FØROYAR konsert á Vaglinum í Havn, har nakrir av fremstu bólkunum í landinum fara at vísa sín stuðul til at Føroyar verða skipaðar sum fræls tjóð, á jøvnum føti við allar aðrar. Og at okkara tjóð og okkara merki kann verða viðurkent fyri altjóða samfelagnum í Sameindu Tjóðum, soleiðis at okkara merki kann veitra frítt saman merkjunum hjá øllum heimsins frælsu tjóðum.

Millum luttakandi bólkarnar eru m.a. Clickhaze, sum í summar eitt nú fara út at umboða Føroyar á stóra Roskilde Festivalinum. Unga Tjóðveldi fer umframt at hátíðarhalda Merkið at gera vart við, at tað várar í Føroyum. Tað grør um gangandi fót.

Tónleikabólkarnir, sum vera við, eru hesir:

CLICKHAZE
200
SIDE EFFECT
FLUX
HVØRVISJÓN

Umframt tónleik vera eisini styttri røður á skránni. T.d. verður skiparin, reiðarin, hugsjónar- og fólkatingsmaðurin av Glyvrum, Torbjørn Jacobsen umboðaður bæði sum røðari og sum tónleikari saman við Sámali Ravnsfjall í bólkinum Hvørvisjón. Eisini verða aðrir loysingarhugaðir røðarar á pallinum ímillum at bólkarnar spæla.

Frásøgumaður verður Tróndur Vatnhamar.

FREE FØROYAR tiltakið er ókeypis, og verður beint eftir at vanliga Flaggdagshaldið, ið byrjar Kl. 15.00. Øll eru hjartaliga vælkomin, sambands og loysingarhugað, ung sum gomul.

Lesið
Sosialurin
-tað
loysir seg

Funnu kanadiskan fløskupost í Sandavági

Tveir sandavágsdreingir funnu týsdagin ein fløskupost, sum var komin allan vegin úr Kandada

FLØSKUPOSTUR
Edvard Joensen

Sandavági: Týsdagin funnu sandvágsdreingirnir Tummas Albert Thomassen og Jens Erik Nielsen, ein fløskupost, sum komin var allan vegin úr Kanada til Sandavágs.

Teir vóru, sum teir so mangan plaga, farnir ein túr oman á sandin at vita, hvat har var at finna.

Millum rekarnar, har lógu hendan dagin, var eisini ein klár glasfløska við einum pappíri í. Teir tóku hana upp og funnu eitt bræv, sum ein tíggju ára gomul kanadisk genta hevði skrivað í august mánaða í fjør.

Hon gongur í einum skúlaflokki í Halifax á Nova Skotia, sum hevur gjørt eina verkætlan, har tey millum annað hava tveitt 50 fløskupostar á sjógv í teirri vón, at teir verða funnir aftur, og at tey, sum finna teir, seta seg í samband við flokkin.

Saman við brævinum frá Samanthu, sum gentan eitur, lá eisini ein teldutskrivaður seðil við frágreiðing um verkætlanina og adressum at seta seg í samband við. Einar tvær teldupostadressur vóru, so lætt verður at koma í samband við tey har yviri.

Teir báðir, Jens Erik og Tummas Albert, siga, at tað fara teir eisini at gera, og so verður spennandi at vita, hvat fer at spyrjast burtur úr tí.

Teir báðir, Tummas Albert Thomassen, v.m. og Jens Erik Nielsen, úr Sandavági funnu ein fløskupost Niðri á Sandi týsdagin. Fløskuposturin var komin allan vegin frá Nova Skotia í Kanada

Mynd: Edvard Joensen

Gongur væl undir Vestmannsundi

Arbeiðið upp á undirsjóvatunnilin undir Vestmannsundi gongur eftir ætlan. Leiðslan sigur seg kunna standa inni fyri, at um hálvan februar komandi ár verður koyrandi undir Sundinum. Men arbeitt verður fram í móti, at tað skal verða fyrr

SAMFERÐSLA
Edvard Joensen

Arbeitt verður við eini bummskipan til tess at fáa inn pening frá teimum, sum fara at brúka Vágatunnilin.

Dávur Reinert Hansen, stjóri fyri partafelagnum Vágatunlinum, sigur, at enn er einki avgjørt, hvør skipan tað skal vera. Men væntandi verður tað ein, sum helst skal vera so sjálvvirkandi, at fólki als ikki nýtist at vera á staðnum. Okkurt sovorðið sum skrásetir bilin, so til ber at koyra fram móti eini automat at gjalda, sigur stjórin fyri Vágatunlinum.

Hann roknar við, at avsláttarskipanir, sum kendar eru aðrastaðni frá, fara at vera at fáa her eisini.

– Tað vildi nokk verið órealistiskt at hugsa annað, heldur Dávur Reinert Hansen. Men hann vil ikki koma inn á, hvat tað kann fara at kosta at koyra ígjøgnum tunnilin.

Hinvegin eru varisligar metingar gjørdar av, hvussu nógv ferðslan gjøgnum tunnilin man fara at verða.

Roknað hevur verið við, út frá tølum frá ferjunum, at einir 350 bilar fara at koyra undir Vestmannsundi um samdøgurði.

Tað verður heilt givið rættiliga nógv fyrstu tíðina, men tann ferðslan man skjótt fara at leggja seg í eina fasta legu, væntar Dávur Reinert Hansen.

Tíðarætlanin sigur, at undirsjóvartunnilin skal vera liðugur í seinasta lagi hálvan februar komandi, og tað verður hann eisini. Men miðað verður ímóti, at tað kann verða fyrr. Nær tað er, vil stjórin í partafelagnum Vágatunlinum ikki upplýsa.

Vegbreytin

Dávur Reinert Hansen sigur, at í løtuni verður arbeitt við at gera vegbreytina inni í tunlinum.

Einir hundrað metrar av vegbreytini verða grivnir upp í senn, og so verður nýtt, drenandi tilfar lagt aftur ístaðin. Samstundis verða rennur og brunnar gjørd, so tá tað er liðugt umleið hálvan mai mánaða, er bara eftir at asfaltera sjálva vegbreytina.

Vegarbeiðið uttan fyri tunnilin er eisini í gongd báðu megin. Í Leynym eru teir komnir væl áleiðis við at stoypa brúna, og fylt verður eisini út við sjálva brúnna og til rundkoyringina, sum gerast skal við tunnilsmunnan. Síðan verður dekkið á brúnni stoypt.

Vágamegin eru teir so smátt farnir undir at gera tað stóra svingið oman fyri Fútaklett og tann vegin, sum gerast skal av nýggjum í tí sambandinum.

Roknað verður við, at nýggjur vegur skal gerast einar hálvannaðhundrað til tveyhundrað metrar frá svinginum niðan móti Hálsinum. Eisini skal Oyrargjáarvegurin bindast í tann nýggja vegin. Hetta arbeiðið fer rættiliga í gongd nú út á varið, og so verður arbeitt, til liðugt er.

Kaðalarbeiðið

Inni í sjálvum tunlinum verður farið undir kaðalarbeiðið nakað skjótt, upplýsir Dávur Reinert Hansen.

Arbeiðið er boðið út, og fýra tilboð eru innkomin. Roknað verður við, at byrjast kann upp á tað arbeiðið um hálvan juni mánaða.

Tey fýra tilboðini, sum komin eru inn, eru øll frá fyritøkum, sum hava føroyska løggilding.

El-, telefon- og radiokaðalar skulu leggjast inni í tunlinum. Hetta arbeiðið kann gerast, samstundis, sum arbeitt verður við at tekja tunnilin, upplýsir stjórin.

Tá tað er liðugt, eru bara snøklarnir eftir, um sigast kann so. Slíkt sum kantsteinar og merking av vegbreyt.

Eisini vegurin til tunnilin skal gerast liðugur út á heystið. Sovorðið sum bilverja, vegristir og hegn fram við vegbreytini, sigur Dávur Reinert Hansen.

Parkeringsviðurskifti

Í samband við tosið um tunnilin undir Vestmannsundi verður ofta komið inn á parkeringsviðurskiftini í Vágum. Vist verður á, at serliga í samband við flogvøllin eru parkeringsviðurskiftini ov vánalig.

Finnbogi Niclasen, flogvallarovasti, sigur, at arbeitt verður av allari kraft at fáa loyst hendan trupulleikan.

Tað verður ikki nøkur separat loysn við parkeringsplássum, sigur Finnbogi Niclasen, uttan ein samlað loysn við øllum flogvallarøkinum uppií.

– Men vit kunnu altíð hava ein fyribilsloysn klára, tá tunnilin letur upp, so fólk fáa sett bilarnar frá sær, sigur hann.